Lagt til rættis hava praktikantarnir Kristvør Andreasen og Ásleyg Súnadóttir úr Argja skúla.

# Børn í Hoyvík við til fletting



*Birgir@sosialurin.fo*



Hesar seinastu dagarnar hevur Sosialurin havt greinar um fjallgongu og fletting. Hvønn fríggjamorgun frá klokkan 10 til klokkan 11 hevur Rás2 havt eina veðrasending, har kappast verður um Føroya størsta veðr.

Fríggjadagin 3. oktober vóru dreingirnir í 3. a í Hoyvíkar skúla, saman við pápum inni á Gøtu og flettu.

Ingi, ið gonur í 3. a í Hoyvíkarskúla, átti ein veðr, sum hevði gingið í haganum norðuri í Tjørnuvík. Veðrurin sum var veturgamal, hevði gingið í hagapartinum »Heiman Kamb«.

Klokkan 17 varð gjørt klárt at fletta, dreingirnir vóru sera spentir. Fyrst varð ein felgasmynd tikin av dreinginum saman við veðrinum. Aftan á felgasmyndina var veðrurin bundin niður, mett var um vektina, teir flestu mettu hann frá umleið 60 til 70 pund. Síðan var veðrurin skotin og hærnast svavdur. Tað var kanska eitt sindur ólekkurt, men eingin svímaði.

So varð farið í holt við at tumma. Páparnir vóru heilt óførir og hjálptust at, og áðrenn vit vistu av, so var skinnið leyst av krovinum.





Krovið bleiv síðan flutt yvir á eitt flettingarborð, har tað var opnað. Tá alt var tikið innan úr krovinum, og so varð eisini skivað og válgarin loystur.

Tað var spennandi at viga, og tey dugdu bara heilt væl at gita, tí veðrurin vigaði 64 pund, og má tað sigast at vera góð vekt.

Aftan á flettingina fingu dreingirnir pitsa, sodavatn og eisini saft. Tað dámdi teimum óføra væl, og væl var etið.

Páparnir fingu eisini okkurt. Teir fingu kaffi, vaflir og skuffukøku.

Samanumtikið má sigast, at hetta var eitt sera væleydnað tiltak. Og ein ordiliga góður dagur.





